Til minnis um

Gudrid Jacobsen

Fødd hin 22. apríl 1940; deyð hin 6. juli 2000

Tung og sorgmil vóru boðini, eg fekk hósdagin 6. juli. Gudrid fastur var farin, bert 60 ára goul. Hetta var óskiljandi, tað vóru bert fáir dagar síðani, at vit høvdu vitjað hana suðuri í Vági, og vit gleddu okkum at fáa hana norður at vitja; hon segði okkum tá, at hon skuldi fara norður mikudagin at vitja Jóhan Martin, og at hon væntaði at koma ein túr til okkara eisini. Men so skuldi ikki verða.

Gudrid var eitt ótrúliga hjartagott menniskja. Eg minnist frá barnaárum, hvussu gleðiligt tað var at fara suður til Vágs at ferðast við pápa. Altíð kendi ein seg vælkomnan, og mangan mundi húsið hjá Gudrid og Hendrik vera karmur um skemtiligar løtur.

Tað vóru eisini løtur, tá ið vit vóru í lítla báti og neyvan mundi nakar ansa betur eftir okkum, enn júst Gudrid; mangan hevur hon staðið og kikað eftir bátinum. Gudrid var altíð so bangin um tey, sum vóru í báti.

Mong við mær kunnu siga, at Gudrid var ein húsmóðir í orðsins rætta týdningi. Hon vartaði upp við øllum góðum, og sjálvt um vit onkuntíð vóru 18 fólk í húsi, so sveik Gudrid ongantíð; hon tjúklaði um okkum øll, og eigur hon mikla tøkk fyri tað.

Tá ið pápi so brádliga doyði í 1984, gjørdist tað ein meira tung byrða at fara til Vágs. Pápi hevði altíð verið hann, sum fekk okkum at koma við suður, og nú hann ikki var longur, tyktist tað meiningsleyst at fara til Vágs. Men aftur her vísti Gudrid sítt góða hjarta; sjálvt um hon hevði mist bróður sín, so slepti hon ongantíð okkum. Hon gjørdi alt til at varðveita tey bond, sum vóru – og eru – knýtt okkara millum; hon ringdi trúfast til okkara, og altíð kendi tú til umsorgan og gleði frá Gudrid.

Seinastu trý árini hava vit vitjað aftur í suðri; tó, vit hava ferðast á Økrum, har sum Gudrid var ættað, men at kalla hvønn dag meðan vit hava ferðast í suðri, hava vit vitjað Gudrid, og altíð hava vit kent okkum hjartaliga vælkomin. Onkran dagin var hon einsamøll í húsi; teir báðir Hendrik og Birgir vóru á útróðri, og tá var Gudrid kanska serliga glað um at fáa vitjan.

Nú Gudrid ikki telist millum okkara longur, verður tað tómligt at vitja í Vági. Tað er so torført at skilja, at tá tú kemur á gátt hjá Hendriki, so er ongin Gudrid; men, Harrans vegir veit ongin um, og er tað hjá Honum, Gudrid nú er.

Góði Hendrik, tað man tykjast torført og kanska vónleyst at fata, at tú hevur mist tína elskaðu konu. Sorgin og saknurin er stórur og orð gerast fátøk. Lít tú á Harran, Hann veiti tær styrk til at koma yvir saknin og sorgina. Og tit, Jóhan Martin, Mary Ann, Leila og Birgir, tit hava mist eina mammu, sum elskaði tykkum nógv. Hjá tykkum, eins og hjá pápa tykkara, kennist løtan tung og sorgmikil. Tað er mín vón, at tit við stuðli frá Haranum koma ígjøgnum hesa tíð.

Friður veri við minninum um fastur mína Gudrid Jacobsen.

Hvíl í friði, góða Gudrid.

Andrass

Til minnis um

Edvard Niclassen

Tung og ófatulig vóru boðini, eg fekk ólavsøkuaftan, júst sum eg stóð og læt meg og børnini í føroyska búnan.

Edvard var deyður, eg skilti tað ikki og eg skilji tað ikki enn.

Mikudagin var hann púra livandi, eygu hansara brosaðu og vit koyrdu ein langan biltúr. Í nakrar tímar vóru vit saman hendan dagin og einki bar tekin um, at hetta fór at verða seinastu ferð, vit sóust. Ólavsøkan stóð fyri durum og Edvard skuldi hoyra hýruvogn og nógv var, sum skuldi fáast av skafti.

Gott, at eingin veit frá at siga, nær løtan er komin, har Harrin loysir ein úr jarðarinnar pínufulla lívi.

Edvard var ein persónur, sum kendi allar tær sorgir, lívið kann veita einum menniskja. Hóast hann var bert 58 ára gamal, hevði hann óivað upplivað meira enn tey flestu av okkum nakrantíð koma til. Hann hevði havt nógvar sorgir og eisini nógva gleði. Hóast alt tað pínufulla, var hann eitt ljós millum menn. Hann var ein flottur persónur og mann hann óivað hava knúst mong kvinnuhjørtu og eisini glett fleiri.

Eg eri sera fegin um at vera ein av teimum, sum fekk Edvard sum rættan vin. Hann var altíð fúsur at hjálpa og var okkurt (tað hendi sjáldan) hann ikki kláraði sjálvur, ja, so kendi hann rætta persónin, ið kundi. Tann stóri fólkaskarin í kirkjugarðinum vísti, at nógv vóru, sum kendu Edvard, og óivað hevur hann rætt mongum av okkum eina hjálpandi hond. Hóast hetta vóru ikki nógv, ið vitjaðu hann í vakra heimi hansara.

Tvillingasysturin Ebba, sum býr í Noregi og júst hevði verið í Føroyum, búði tá hjá Edvardi, tit prátaðu so væl saman um alt.

Guðrið og Nanna vóru komnar heim til Føroya at búgva og tað frøddist Edvard um.

Jóannes, yngsti sonurin, fekk húgvuna í summar og Edvard var stoltur av at skula niðan í Viðarlundina til hátíðarhaldið.

Hesi vóru tey, ið lívið hjá Edvardi snúði seg um. Í hansara hjarta stóð altíð fremst ynski um, at tað mátti ganga teimum væl, ið hann var góður við. Hetta merktu vit eisini í tí dagliga.

Edvard var lættur í sinni, hann dugdi væl at læra frá sær og ein kundi ikki lata vera við at fylgja ráðum hansara, tí um nakar, ja so kendi hann til lívið og til nær tingini eydnaðust og nær tey ikki eydnaðust.

Í Auto var Edvard kendur sum ein góður arbeiðsfelagi og bæði starvsfólk har og viðskiftafólk koma at sakna henda blíða, róliga og altíð fryntliga bilførara.

Edvardi dámdi væl alt føroyskt, honum dámdi væl at lesa føroyskar bókmentir, at hoyra føroyskan tónleik og kvæðir, honum dámdi sera væl ta føroysku náttúruna og føroyskan mat. Hann plagdi at siga: »Tá føroyingar fara at liva av pizza og pasta, tá er alt farið«.

Nógv er at minnast aftur á og keðiligt, at vit ikki kundu fáa fleiri góð ár saman við Edvardi. Hóast alt hevur hann megnað at geva mær og mínum so nógvan kærleika, hann hevur lært okkum, hvat rættiligt vinarlag er og vit eiga nógvan vísdóm eftir hann.

Mugu øll góð minni um Edvard liva víðari í hjørtum okkara.

Seinast ynski eg tykkum, Ebba við familju, Guðrið og Nannu og Jóanisi troyst og styrki í sorg tykkara og eg veit, at nú gerandisdagurin aftur byrjar, fara vit veruliga at merkja, hvussu stóran týdning Edvard hevði fyri okkum, sum vóru góð við hann.

Altíð vil eg goyma og ikki gloyma minnið um teg, Edvard.

Heilsan,

ein vinkona

Lær teg enskt

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út "Lær teg enskt" eftir Ásu Hátún og Unu Poulsen.

"Lær teg enskt" er ætlað undirvísingini í skúlaverkinum: framhaldsdeild fólkaskúlans, miðnámsskúlum og hægri skúlum, men hon er eisini væl hóskandi til sjálvlestur hjá teimum, sum vilja læra seg enskt.

Hjá lærarum og næmingum í enskum hevur tað verið ein stórur meinbogi bara at hava útlendskar málærur at leita til. Við hesum í huga fóru Ása Hátun, lærarаskúlalærari í Havn, og Una Poulsen, fólkaskúlalærari í Vestmanna, undir at skriva enska málæru ætlað føroyska skúlaverkinum.

Arbeiðið við málærunum hevur rokkið um nøkur ár, og tilfarið hevur verið roynt í fólkaskúlanum og læraraskúlanum.

Úrslitið gjørdist tvær bøkur: **Ensk málæra**, sum kom út í 1995, og nú **Lær teg enskt**, sum eisini er málæra.

Ensk málæra ***er ætlað næmingum í fólkaskúlanum og er skipað soleiðis, at hon lýkur krøvini til fráfaringarroynd fólkaskúlans við grundleggjandi reglum og bendingum. Men í 9. og 10. flokki eru nógvir næmingar á rættiliga høgum støði, og hava hesir tørv á meiri víðfevndari málæru.***

Lær teg enskt ***miðar ímóti hesum økinum, og hon er skrivað út frá royndum hjá høvundunum sum lærarar í fólkaskúla og lærara-skúla.***

Bókin er skipað á vanligan hátt, har ið orðaflokkarnir verða viðgjør-dir hvør sær. Føroyskt og enskt verður samanborið, tá ið hetta er gagnligt, og bygt verður á tann málkunnleika, sum næmingarnir hava úr føroyskum.

Bókin byrjar við einum stuttum yvirliti yvir ljóðlæru og almennar stavsetingarreglur. Málærureglur standa í littum kassum, og har tað hevur borið til, standa dømi út fyri kassunum. Tekningar stuðla dømunum. Aftast í bókini eru leitorð, sum vísa til greinar.

Olivur við- Neyst hevur teknað myndirnar. Kápuna hava Ingi Joensen -og Olivur við Neyst gjørt. Satsur, umbróting og prentumsiting hevur Hestprent staðið fyri.

Lær teg enskt er 192 síður og kostar 140,- kr.

Avskipa gamalt jarn

Nøgdin av gomlum jarni, sum flutt verður av landinum er tíggjufaldað, síðan byrjað varð

EDVARD JOENSEN

Sund: Føroyingar eru vorðnir meira at sær komnir, tá hugsað verður um umhvørvið. Í hvussu er, um farast skal eftir nøgdini av gomlum jarni, sent verður av landinum.

Mánadagin lá eitt farmaskip á Sundi og lastaði gamalt jarn frá Kommunalu Orku og Brennistøðini á Sandvíkahjalla.

Kommunala Orku og Brennistøðin sendir regluliga gamal jarn av landinum. Higartil í ár eru farin fýra túsund tons, sigur Mikkjal Absalonsen, stjóri á Kommunalu Orku og Brennistøðini. Hann roknar við, at samlaða nøgdin fer at liggja umleið tey seks túsund tonsini, tá árið er farið.

Hetta er ein tíggjufalding, síðan byrjað varð miðskeiðis í nítiárunum, tá árliga nøgdin var seks hundrað tons, sum avskipað vórðu í bingjum. Tað var skjótt, at tað gjørdist ov trongligt, og teir fóru at leiga smærri farmaskip. Síðan eru skipini vaksin. Í dag lasta skipini eini túsund tons hvørja ferð, sigur Mikkjal Absalonsen, stjóri á Kommunalu Orku og Brennistøðini.

Hann sigur, at alt kemur ikki frá teimum sjálvum kortini. Teir fáa eisini jarnburturkast frá IRF brennistøðini í Leirvík.

Tað er ikki tí, at tað loysir seg fíggjarliga at senda gamalt jarn av landinum, sigur Mikkjal Absalonsen. Prísurin er tengdur at prísinum á heimsmarknaðinum. Og hann er lágur í løtuni. Tað fáast bara einar trýhundrað krónur fyri tonsið í løtuni, meðan teir onkuntíð hava fingið fimmhundrað krónur fyri tonsið.

Men brennistøðin fær eitt ávíst gjald fyri at taka gamlar bilar inn og beina teir burtur. Og tað er hetta gjaldið, sum rindar fyri tænastuna, teir gera føroyska umhvørvinum við at senda øll hesi tonsini av brúktum jarni av landinum.

Merginparturin verður sendur til Skotlands, sigur Mikkjal Absalonsen, stjóri á Kommunalu Orku og Brennistøðini á Sandvíkahjalla. Hann sigur, at skotar gera okkurt smávegis við jarnið, sum síðan fyri tað mesta verður sent til Spania, har tað verður endurnýtt.

Neytalortakapping

Komandi vikuskifti kann ein heppin sandingur fáa ein heilan tarv fyri 100,- krónur. Um tarvurin bara er so vinaligur at skíta á stykkið hjá honum

EDVARD JOENSEN

Sandur: Komandi vikuskifti fer B 71 at selja lutaseðlar, har vinningurin er ein livandi tarvur.

Men tað verður ikki Notarius Publicus, ið, sum vanligt er, fer at finna hepna vinnaran. Tað avger tarvurin sjálvur. Ella rættari sagt ein neytalortur.

Tíðindablaðið Sosialurin frættir av Sandi, at tey hava hegnað eitt stykki inni, sum so aftur verður býtt sundur í 400 smærri lutir. Hvør lutur fær so eitt nummar.

Seldir verða so 400 lutaseðlar á kr. 100,-, svarandi til numrini á jarðarlutunum. Tá allir seðlarnir eru seldir, verður tarvurin, sum buirturlutaður verður, sleptur inn á innhegnaða stykkið, meðan vakt verður hildin yvir honum. Tí hetta er alvorligt, skilst.

Tað er nevniliga so, at tann, sum eigur tann jarðarlutin, sum fær ta æru at verða tann fyrsti, tarvurin skítur á, vinnur tarvin.

Sum skilst heiman av Sandi, vænta tey ikki, at tað fer at standa á at sleppa av við allar 400 lutaseðlarnar, hóast teir kosta 100,- krónur.

Havnin í oljusamstarv við Stavanger

Endamálið við samstarvinm er at fremja búskapar- og vinnulívsmenning í báðum býnum í sambandi møguligan oljuídnað í Føroyum

EYÐUN KLAKSTEIN

Tórshavn: Tórshavnar kommuna og Stavanger kommuna fara í næstu viku at skriva undir samstarvsavtalu.

Undirskrivingin fer fram í sambandi við oljustevnuna, sum verður í Stavanger frá týsdegnum til fríggjadagin í næstu viku.

Samstarvsavtalan skal hava við sær búskapar- og vinnulívsmenning í báðum býunum, um veruligur oljuídnaður tekur seg upp í Føroyum.

Býirnir ætla eisini at samstarva um mentan, útbúgving og ítrótt.

Skriva undir mikudagin

Tað verða borgarstjórarnir í Havn og Stavanger, Leivur Hansen og Leif Johan Sevland, sum fara at skriva undir avtaluna á eini samkomu á ráðhúsinum í Stavanger mikudagin. Til staðar verða eisini Jan Christiansen, Heðin Mortensen og umboð fyri fyrisitingina hjá Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna gjørdi í fjør eina líknandi avtalu við Aberdeen, og ætlanin er, at ítøkilig úrslit av hesum samstarvinum skulu á borðið á felagsfundi í Aberdeen í oktober og í Havn í juni næsta ár.

Við avtalunum við Stavanger og Aberdeen hevur Havnini fingið samstarv í lag við báðar teir størstu oljubýirnar í Europa.

Eisini list

Á oljustevnuni í Stavanger í næstu viku verður eisini eitt mentanartiltak á havnalagnum í norska býnum. Har sleppa samstarvsbýirnir hjá Stavanger at marknaðarføra seg á ymsan hátt.

Bingjulistaverkið hjá Tróndi Patursson fer at standa við síðuna av tjaldinum hjá Havnini, og Tróndur er eisini boðin við sum luttakari. Hann fer at halda fyrilestur um arbeiði sítt sum listamaður og um ævintýrferðir sínar.

Umframt Havnina fara eisini býir sum Perth í Australia, St. Johns í New Foundlandi og Kristiansund at vísa ymiskt fram undir tiltakinum á havnalagnum